# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

## Serligur barnadópur flaggdagin



*Á myndini eru f.v.: Jákup Kass prestur (abbi Súsonnu og langabbi Miriam) Súsanna Kass Kristiansen (við lítlu Miriam), Heini S. Kristiansen, Súni Kristiansen organistur, (pápi Heina og abbi Miriam), og Heini F. Petersen deknur (abbi Heina og langabbi Miriam)*

Flaggdagin 25. apríl varð lítla dóttir Súsonnu og Heina Kristiansen á Nesi, Miriam Kass Kristiansen, doypt í Fríðrikskirkjuni á Toftum.

Tað, sum var serligt við hesum barnadópi var, at tað var langabbin sum var prestur, ein annar langabbi var klokkari, meðan ein abbi var organistur.

## Vestmanna kirkjukór til Nólsoyar

Mikukvøldið tann 30. apríl kl. 20 verður sangløta í Nólsoyar skúla, har Vestmanna Kirkjukór syngur.

Á skránni verður kórsangur, solosangur og felagssangur.

Vestmanna kirkjukór er 30 ár í ár, og tað er í hesum sambandi at kórið er á ferð.

Kórið telur uml. 25 fólk, kórleiðari er Erla Olsen, sum hevur verið leiðari øll árini

Tiltakið er heilt ókeypis, men fólk kunnu lata eitt oyra til Vestmanna Kirkjukór.

Øll eru vælkomin.



Sosialurin

Lesið Sosialin - so eru tit við

†

## Andlát og jarðarferðir

**Astrid Frederiksen, Tórshavn**, andaðist sunnudagin á Ellisheiminum 100 ára gomul. Andakt verður á Ellisheiminum týsdagin klokkan 16. Jarðarferðin verður úr Kirkjugarðskapellinum mikudagin klokkan 13. Tey ið vilja minnast Astrid, kunnu lata eina gávu til Ellisheimið í Tórshavn.

**Petur Skaalum í Hvalba** andaðist leygarkvøldið, 85 ára gamal. Farið verður úr kapllinum á Surðuroyar Sjúkrahúsi týskvøldið klokkan 18 í Hvalbiar kirkju. Jarðarferðin verður mikudagin klokkan 13 úr Hvalbiar kirkju. Tey, ið vilja minnast Petur, kunnu lata Missiónshúsinum í Hvalba eina gávu. Konta í peningastovnunum.

**Katrin Skarðhamar** andaðist sunnudagin í Herborg í Jútlandi 60 ára gomul. Jarðarferðin verður kunngjørd seinni.

**Kristina Tallman**, dóttir Jákup í Glasstovuni í Klaksvík, andaðist í New Hampshire, 26. apríl, 91 ára gomul.

†

Kunngjørt verður fyri ætt, vinum og kenningum at okkara góði pápi, verpápi, abbi og langabbi

**Svend Joensen**
frá Gjógv

andaðist á Landssjúkrahúsinum 27. apríl, 96 ára gamal.
Farið verður úr kapellinum á Landssjúkrahúsinum mikudagin 30. apríl, kl. 17.00.
Jarðarferðin verður úr Gjáar kirkju Kristi himmalferðardag kl. 14.00.

*Fyri tey avvarðandi*
**Arne, Sedea, Henry og Eyðsvein**

Tey, ið vilja minnast Svend, kunnu lata eina peningagávu til Gjáar kirkju

†

Kunngjørt verður ætt, vinum og kenningum, at elskaði maður og pápi okkara

**Arnfríður Heiðar Bjørnsson**

andaðist mánadagin 28. apríl, 60 ára gamal.

**Oda, Elsa, Helga, Hallberg og Ólafur**

**Dagurin**
**30. apríl. Severus.** Var í fimtu øld biskupur í Napoli.